DAGSINS MEINING

Anders Fogh Rasmussen vitjar

Ígjár og í dag vitjar nýggi forsætisráðharrin. Grundleggjandi kann sigast, at Anders Fogh Rasmussen vísir Føroya landi virðing við at vitja so skjótt eftir stjórnarskiftið.

Afturímóti ber eisini til at viðmerkja, at Anders Fogh Rasmussen er forsætisráðharri fyri alt fólkið. Tað kundi tí í fyrstu atløgu tykjast politiskt óbúgvið, at hann bara skuldi landsstýrisflokkarnar og tann eina andstøðuflokkin, Sambandsflokkin. Í evstu løtu loddaði hann so kortini dýpið ella var tað tí at andstøðan gjørdi vart við sína misnøgd, og hann beyð øllum tingfólkunum á fund.

Hetta má metast skilagott, serliga, tá vit hugsa um, at Javnaðarflokurin situr kanska við lyklinum til eina komandi stjórnarskrá fyri Føroya land. Skilt á tann hátt, at ferð eftir ferð hava eygleiðarar – og henda oddagrein sanniliga eisini – staðfest, at tað verður torført at fáa eina berandi nýskipan uttan um miðjuna í tjóðskaparliga spektrinum.

Fleiri meiningarkanningar hava eisini víst, at tey flestu vilja hava eina millumloysn millum fullveldi og heimastýri. Tað skal ikki stórt politiskt innlit til fyri at kunna staðfesta, at uppskot Javnaðarfloksins um ein sjálvstýrissáttmála er ein millumloysn. Henda ætlan liggur bæði millum fullveldisflokkin og sambandsflokkin í aktuellu politisku støðuni, og hon er eisini ein ávegis leið móti fullveldi ella loysing, tá tíðin er búgvin og meirilutin ynskir tað.

Undan vitjanini hevur forsætisráðharrin aftur staðfest, at danska stjórnin er sinnað at samráðast um tey málsøki, sum landsstýrið hevur ynskt at yvirtaka, og sum vit hava rætt til sambært heimastýrislógini. Hetta er tí einki nýtt. Eisini hevur hann staðfest, at vit kunnu t.d. ikki yvirtaka uttanríkis- og hernaðarmál!

Í hesum liggur ein veikleiki í nýggja "sjálvstýrispolitikki" landsstýrisins, sum bara miðar ímóti at yvirtaka eftir heimastýrislógini. Høvdu vit valt at samráðast um ein nýggjan sjálvstýrissáttmála, kundu vit kravt at fáa størri ávirkan og størri ræði í uttanríkis- og hernaðarmálum og fingið tað staðfest í einum sáttmála longu nú.

Tað nýggja í danska stjórnarpolitikkinum verður, sambært Anders Fogh Rasmussen, at samráðingar og samskifti skulu fara fram í einum meira fordragiligum tóna. Partarnir skulu sýna hvørjum øðrum virðing, og tað má galda fyri báðar partar. Hinvegin kunnu vit ikki rokna við stórvegis broytingum, tí nýggju stjórnarflokkarnir stóðu øksl móti øksl við gomlu stjórnarflokkarnar í at nokta landsstýrinum eina 15 ára langa skiftistíð eftir fullveldisætlanini.

Hóast vitjanin er eina viku eftir at landsstýrið setti skjøtul á valstríðið við at boða frá ábótum til fólkapensjónistarnar, og tí í so nær einum vali, skal forsætisráðharrin vera vælkomin. Vónandi kemur okkurt gott burturúr, øllum Føroya fólki at gagni.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Vikublaðið Fregnir manglar tilfar

Katrin Dahl Jakobsen

Seinasta vikublaðið "Fregnir" sigur meg hava úttalað mína støðu um Helenu Dam á Neystabø og Javnaðarflokkin. Greinskrivarar eru Ó. J. Rólantsson og Høgni Mohr. Ó. J. Rólantsson havi eg ongantíð tosað við – veit ikki, hvør maðurin er. Høgna Mohr havi eg einaferð tosað við. Tað var beint fyri jól og snúði seg um karamellur og ikki Helenu Dam á Neystabø.

Fólkaítakið fyri tjóðfundi:

Til Føroya landsstýri og stjórn Danmarkar!

Fólkaítakið fyri tjóðfundi heitir hervið á tygum um at fáa demokrati sett í verk í ríki okkara.

Tað er tygum kunnugt, at longu í miðøldini gjørdi ríki okkara kongsfelagsskap við Danmarkar ríki. Seinni varð gjørdur ein ríkjasambandssáttmála millum bæði ríkini. Hesin sáttmáli ásetur, at vit ? hvør í sínum lagi? ráða fyri okkara egnu viðurskiftum og eru javningar í felagsmálum.

Tann 14. august 1662 samtyktu vit eina stjórnarskrá, har vit góvu kongi okkara alt lóggávuvald, alt útinnandi vald og alt dómsvald.

Í 1814 gekk kongur okkara undir ein sáttmála við Svøríki, har hann rindaði land fyri frið og ásetti, at ríki okkara skuldi missa sítt navn. Men framvegis høvdu vit ta somu stjórnarskrá, sum gav kongi okkara alt vald.

Í 1849 fingu íbúgvarnir í Danmarkar ríki eina stjórnarskrá, sum gav teimum frælsi til at stýra sínum egna ríki.

Eina slíka frælsa stýrisskipan hava vit ongantíð fingið. Tað vald, vit góvu kongi okkara í 1662, er í stóran mun framvegis hjá honum.

Tað sigur seg sjálvt, at hetta er ein fullkomuliga avoldað og ódemokratisk skipan at bjóða borgarum at liva undir nú í 2002.

Ávís demokratisk framstig eru hend, og tey fegnast vit um. Tað var framstig, at vit fingu umboðan á ríksdegnum í 1851, og at løgtingið varð endurreist í 1852. Somuleiðis var tað eitt framstig at øll fingu valrætt fyri smáum hundrað árum síðani.

Bráðfeingis stýrisskipanin frá 9. mei 1940 eins og heimastýrisskipanin fluttu enn meiri av tí valdi, vit høvdu givið kongi í 1662, aftur til okkara, og var talan her um munandi demokratisk framstig.

Men tað er eitt bakkast fyri demokratisku hugsjónina, at tann samtykt, sum varð gjørd av føroyska fólkinum á fólkaatkvøduni tann 14. september 1946 um, at Føroyar skuldu gerast eitt sjávstøðugt ríki, ikki enn er sett í verk.

Somuleiðis er tað ódemokratiskt og í stríð við tann sáttmála, sum galdandi er millum okkara og Danmarkar ríki, at danskir skattgjaldarar á sínari fíggjarlóg gjalda pengar til ávísar almennar uppgávur í ríki okkara. Hervið leggur annað ríkið seg út í innanhýsis viðurskifti í hinum ríkinum, og tað er í stríð við ta altjóða skyldu, sum Danmark átók sær við at skriva undir sáttmálan við okkum.

Árliga veitingin úr danska ríkiskassanum stríðir ímóti fólkaræðishugsjónini uttan mun til hvussu veruliga roknistykkið sær út: T.e. um vit hava veruliga vinng av hesi flyting ? ella um vinningurin hjá danska ríkinum av at hava ræðið á okkara ríki er størri enn henda útreiðslan á dansku fíggjarlógini.

Fyri at fáa demokrati í ríki okkara er alneyðugt, at vit fáa eina demokratiska stjórnarskrá eins og hana, danir fingu í 1849. Tí var tað at 3094 borgarar í ríki okkara í 1995 vendu sær til drotning okkara við áheitan um at at fáa í lag val av umboðum til ein tjóðfund, sum ásetur eina nýggja stjórnarskrá og ger av, hvør okkara altjóðarættarliga støða skal vera.

Tíverri sýtti táverandi danska stjórn fyri at ganga hesum ynski okkara um demokrati á møti. Síðani kom eitt nýtt landsstýri til í 1998, sum setti sær fyri, at Føroyar skulu gerast eitt sjálvstøðugt ríki. Táverandi danska stjórnin nýtti tíverri ódemokratiskt fíggjarligt trýst ímóti ætlanunum hjá føroyska landsstýrinum.

Spurningurin, um donsku skattgjaldararnir skulu gjalda hesar upphæddir fyri at berjast ímóti demokratinum í ríki okkara, hevur ongantíð verið lagdur fyri donsku veljararnar, men er tikin av donsku stjórnini av sínum eintingum.

Nú er ein nýggjur forsætisráðharri komin til. Hann umboðar sama flokk sum Knud Kristensen, tann forsætisráðharri, sum eftir fólkaatkvøðuna í Føroyum tann 14. september 1946 var fúsur at fylgja fólksins avgerð, men tíverri varð tikin av ræði av ódemokratiskum kreftum í Danmørk.

Vit skulu heita á Føroya Landsstýri og stjórn Danmarkar at nýta henda nýggja møguleika til at bera so í bandi, at viðurskiftini millum Føroya og Danmarkar verða í samsvari við sáttmálan okkara millum, so at hvør partur stýrir sínum egnu viðurskiftum uttan uppílegging frá hinum, og at vit sleppa at seta demokrati á stovn her, uttan at danska stjórnin forðar hesum við fíggjarligum trýsti.

Vegna
Fólkaítakið fyri tjóðfundi
Líggjas í Bø
Maria Jacobsen
Hans Tausen Olsen
Eirikur Ó. Simonsen
Olaf á Stongunum
Zakarias Wang

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turid Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ein rættleiðing afturat til Eyðólv Dimon

Asbjørn Lómaklett
skúlastjóri

Fyrst takki eg fyri viðmerking tína í Sosiali nr. 6 frá 10. januar.

Lesur hagtøl sum "ein ávísur" hesur halgubók.
Haldi framvegis ikki, at tú ert rættvísur og objektivur, tá tú tekur Klaksvíkar Kommunu og harvið Skúlaverkið fram sum ræðandi dømi um vanrøkt av skúlanum.

Hví ikki heldur vera **positivur** og spyrja: **Hvussu nógvir skúlar her í landinum mundu byrja við teldufrálæru longu í seinnu helvt av 1970-árunum?**

Rokni við, at ter nær um kunnu teljast á aðrari hondini. Kann ikki siga hetta við vissu, men mangir vóru teir ikki. Klaksvíkar Skúli var so ein av teimum fyrstu. Tað tekst ikki burtur.

Hvussu varð frálæran framd.
Sum áður sagt, so var teldustova tøk heilt frá byrjan, og teldutalið skifti nakað frá ári til árs, men vanliga lá talið um 12 – 15 øll hesi árini. Hetta talið var ikki av tilvild, men hildið varð, at bólkarnir til teldufrálæru áttu ikki at vera størri enn 10 – 15 næmingar.

Vallærugrein í 8., 9. og 10 flokki.
Flestu árini var teldulæra vallærugrein í framhaldsdeildini við 2 tímum pr. viku, og um hetta mundið talaði eingin um at hava teldulæru í øðrum flokkum, men treyðugt so, tí teldustovan var tøk allar 36 tímarnar, sum skúlin var opin um vikuna. Tað var tí ikki heilt óvanligt, at lærarar fóru við flokkinum inn í teldustovuna at arbeiða har, men havast má í huga, at flestu árini, ið talan er um, varð fyrst og fremst hugsað um framhaldsdeildina, og nógvir bólkar høvdu teldufrálæru.

Annars var ringt at siga í byrjanini og fleiri av fyrst árunu, hvønn veg tað fór at bera við teldufrálæru í skúlanum. Tosað varð t.d. um, at næmingarnir møguliga skuldu læra at gera skráir o.a. tilíkt.

Ikki avgerandi við talinum av teldum.
Ein og hvør, sum vil síggja tað, sær tí, at hóast teldutalið ikki var stórt, so stóð hølið tøkt allar skúladagar, tá valbólkar ikki vóru inni til frálæru.

Sostatt hevur reglulig teldufrálæra verið í Klaksvík, ið hvussu er frá 1978, helst nakað fyri ta tíð eisini.

Felagshøli fyri báðar skúlarnar.
Serhølini eru felags fyri báðar skúlarnar, so hesin møguleikin hevur staðið øllum framhaldsdeildarnæmingunum, eini 3-400 næm. í boði, sum vanligt var fyrru árini. Tað er tí ikki sakliga beint at røða um 800 næmingar í hesum sambandi.

Eyðólvur ikki álit á kommununum.
Dugi ikki at síggja, at kommunurnar fara at røkja skúlarnar illa. Haldi tvørturímót, at tær skuldu havt alla orsøk til at farið væl um fólkaskúlan, um øll ábyrgdin verður løgd á teirra herðar. Tað er hetta við sundurbýttari ábyrgd, ið ofta riggar vánaliga, og tað er støðan í dag, har land og kommunur hava felags ábyrgd ella nakað, ið líkist tí.

Raðfesting?
Jú, sjálvandi fara kommununurnar at raðfesta íløgurnar til fólkaskúlan, um tær yvirtaka umsitingina av honum, og her verður hugsað um nýbyggingar, ístandsetingar, keyp av kostnaðarmiklum undirvísingartilfari o.s.fr., men tað er einki øðrvísi, enn støðan er í dag, meðan umsitingin er á landsins hondum. Fyrimunurin við kommunalari yvirtøku átti at verið tann, at tá verður skúlin meira sjónskur í nærumhvørvinum, har politikarar á staðnum lættari kunnu setast til svars fyri støðuna í einari skipan, sum skuldi verið minni stirvin enn tann, ið er galdandi í dag.

Býráðið meira opið nú enn nakratíð

Eitt er at vera í andstøðu, men bert at finnast at er ov bíligt

Jan Christiansen
borgarstjóri

Jógvan Arge, býráðslimur, verður endurgivin í Oyggjatíðindum fyri enn einaferð at harta tað býráð, sum hann sjálvur er valdur at umboða.

Hesuferð er hann ónøgdur um, at býráðið arbeiðir ov nógv í loyndum, tvs. at býráðsfundir ikki verða nóg væl lýstir áðrenn fundirnar, og at ikki verður nóg væl kunnað um hesar, eftir at fundurin hevur verið. Eisini fílist Jógvan Arge á, at hann ikki sleppur oftari og longri til orðanna á býráðsfundunum.

Tjóveldisumboðið í býráðnum skrivar m.a.: " Tað undrar meg sáran, at sjálvt skráirnar til teir almennu býráðsfundirnar ikki verða lýstar alment. Tær verða hvørki sendar pressuni, slignar upp á steyrar ella lýstar yvirhøvur."

Eg haldi, at Jógvan Arge eftir at hava sitið í býráðnum í eitt ár, átti at sett seg eitt sindur meiri inn í tey mál, hann úttalar seg um. Vit minnast, at hann fyri stuttum klagaði (alment sjálvandi) um, at hann ikki hevði møguleika at síggja og at seta seg inn í býráðsmálini áðrenn býráðsfundin. Eisini tá fór Jógvan skeivur.

Lat meg (alment) upplýsa Jógvan Arge, býráðslim, at skráirnar til býráðsfundirnar verða sendar fjølmiðlunum. Somuleiðis verða skráirnar lýstar alment í miðbýnum. Skráirnar liggja frammi í Snarskivuni og tær eru somuleiðis á bókasavninum undan hvørjum býráðsfundi, har almenningin hevur høvi at lesa, hvat fyriferst á komandi býráðsfundi .

Kann leggja afturat, at verandi samgonga ætlar at arbeiða so opið sum tilber. Undir síðstu setu, tá tjóðveldisflokkurin hevði leiðsluna í býráðnum, kundi sjálvsagt verið latið enn meira upp fyri tí, sum Jógvan Arge eftirlýsir, men tá var heldur beint tvørturímóti. Býráðið bleiv stevnt fyri Løgtingsins umboðsmanni fyri at nokta at geva alment innlit.

Nú verða allir býráðsfundir lagdir út á heimasíðuna hjá býráðnum beint eftir býráðsfundin, so øll, eisini fjølmiðlarnir, hava møguleika at síggja, hvat m.a. Jógvan og Jan hava tikið avgerð um. Skjótt verður býráðsskráin eisini løgd út á "netið" áðrenn sjálvan fundin.

Seinna hjartasuffið frá Jógvani Arge á hesum sinni er, at hann ikki sleppur at tosa nóg leingi á býráðsfundunum. Hann sigur : " Vit býráðslimir fáa nóg illa sagt okkara meining á býráðsfundunum, so er talutíðin úti. Fundarskipanin er so samanrimpað, at tú fært varhugan av, at tað er til fortreð, at hesir fundir skulu haldast yvirhøvur."

Fundarskipanin fyri býráðsfundirnar loyvir, at hvør býráðslimur fyrst hevur 5 minnuttir og eftirfylgjandi aftur 3 minuttir at siga sína hugsan um málið, sum er til viðgerðar. Harafturat kemur, at tú kanst hava eina viðmerking til hvønn, ið hevur havt orðið. Tvs., at hvør býráðslimur hevur í minsta lagi 10 minuttir at greiða frá síni støðu til hvør av býráðsmál. Hetta er ov stutt tíð, sigur Jógvan Arge, býráðslimur. Ja, hann sigur enntá, at hesir 10 minuttirnir eru bara til fortreð. Eg veit ikki, hvussu leingi Jógvan Arge kundi hugsa sær at havt orðið.

Vit eru 13 býráðslimir, og um hvør av okkum skuldi tosað í 10 minuttir um hvørt mál, sum er til viðgerðar, so vildi hvørt mál tikið yvir tveir tímar at avgreitt. Tá skal havast í huga, at sjálv málsviðgerðin av málinum er farin fram í nevndunum undan býráðsfundin. Vanliga eru um 10 – 15 mál á skránni til býráðsfund, og kann tí ein býráðsfundur, um allir býráðslimir eru eins glaðir fyri at hoyra seg sjálvan, sum Jógvan er, saktans vara í meira enn eitt døgn. So niðurstøðan má verða, at tað ikki er uttan grund, at fundarskipanin hevur ásett hvussu leingi vit kunnu hava orðið.

Lat meg enda við at siga, at fundarskipanin er broytt og gjørd í hesum valskeiðinum og at Jógvan Arge sjálvur hevur atkvøtt fyri at talutíðin til hvønn býráðslimin er sum omanfyri nevnt.

Ósakligur borgarstjóri

Jógvan Arge
býráðslimur í Havn fyri tjóðveldisflokkin

Leygarkvøldið var Jan Christiansen at hoyra í útvarpinum um barnagarðarnar. Hann var ósakligur og manipuleraði við upplýsingum. Óivað gjørdi hann tað, tí hann hevur onga haldbara grundgeving fyri teirri avgerð, sum meirilutin í Tórshavnar Býráð tók seinasta hóskvøld.

Hann vildi vera við, at meirilutin samtykti at lata smápartafelagið hjá Høgna Mikkelsen fáa ein barnagarð at gera, tí ein metingarnevnd hevði innstillað hansara tilboð nummar eitt.

Humlan er bara tann, at býráðið langtsíðani hevur samtykt at annulera alla ta útbjóðingina og ta dømingina, sum tá varð gjørd.

Tann metingarnevndin varð sett í sambandi við ta fyrru útbjóðingina av hesum somu barnagørðunum. Hennara setninguir var at døma um innkomnu tilboðini eftir vektingini: kostnaður 50 prosent, innrætting og útsjónd 30 prosent og tilfar 20 prosent.

Við hesum fortreytumn kom nevndin til, at barnagarðarnir hjá Høgna Mikkelsen blivu nummar eitt, eitt lítið vet framman fyri tilboðini hjá Sp/f Búsetur, men metingarnevndin viðmerkti samstundis, at arkitektoniskt og innrættingarliga vóru tilboðini hjá Búsetri nógv betri.

Men alt hetta varð gjørt til onkis av býráðnum sjálvum.

Tað stóðst sovorðin fløkja av licitatiónini, sum sambært serkunnleikanum ikki kendi sín maka í allari tí civiliseraðu verðini, at býráðið við Jan Christiansen á odda noyddist at annulera útbjóðingina. Millum annað var útbjóðingartilfarið so illa frágingið, at tað bar ikki til at finna út av, hvat stovnarnir fóru at kosta.

Í nýggju útbjóðingini varð boðað frá, at vektingin í dømingini av tilboðunum skuldi vera: kostnaður 40 prosent, innrætting og útsjónd 40 prosent og tilfar 2o prosent.

Við hesum fortreytum kom metingarbólkurin til, at bæði tilboðini hjá Sp/f Búsetri vóru nógv best, og bólkurin mælti kommununi til at taka av teimum báðum, tí hetta var tað, sum kommunan sum heild fekk mest burturúr.

Í tí, sum Jan Christiansen nú førir fram, er tað er týðuligt, at ongar sakligar grundir eru fyri teirri avgerð, sum býráðsmeirilutin hevur tikið um at lata ein av býrðslimunum í samgonguni fáa annan barnagarðin at gera.

Tí ein annulerað licitatión kann ikki á nakran hátt telja við í eini nýggjari licitatión. Heldur ikki, tá politisk avgerð skal takast. Tað er so einfalt.